# Quiz

**1** Smyril Line hevur nú boðað frá, at Norrøna frameftir skal sigla til eina og somu havn í Danmark alt árið. *Í hvørjum býi er hendan havn?*

**2** Føroya Banki eitur ikki longur Føroya Banki. Í eina tíð hevur bankin brúkt eitt annað navn uttanlands, og nú skal hetta navn eisini brúkast í Føroyum. *Hvussu eitur bankin nú?*

**3** Allan Skaalum er farin úr starvinum sum sjúkrahússtjóri á Landssjúkrahúsinum. Í vikuni var ein fyribils stjóri settur at røkja starvið. *Hvussu eitur hann?*

**4** Línuskipini Jákup B og Klakkur hildu rundan føðingardag á Sjómannadegnum í ár. *Hvussu nógv ár hesi skip verið heimahoyrandi í Klaksvík?*

**5** Í vikuni hevur danski uttanríkisráðharrin vitjað í Føroyum. Danski politikarin hevur verið gestur hjá Jørgen Niclasen og hevur vitjað ymsastaðni kring landið. *Hvussu eitur danski uttanríkisráðharrin?*

**6** Fyri at royna at gera enda á seinna verðaldarbardaga, blivu tvær kjarnorkubumbur sleptar yvir Japan. Tann fyrra yvir býin Hiroshima tann 6. aug. 1945. Tann seinna bleiv slept yvir ein annan stóran bý tríggjar dagar seinni. *Hvussu eitur býurin?*

**7** Vit hoyra ofta um oyggjabólkin Saremaa, tá vit luttaka í Oyggjaleikunum. *Hvørjum landi er Saremaa ein partur av?*

**8** Eitt skip hjáumhvørvisfelagsskapinum Greenpeace ger um seg í Grønlandi. Skipið var eisini í føroyskum sjógvi á veg til Grønlands. *Hvussu eitur skipið?*

**9** Fyrrverandi venjari hjá fótbóltsfelagnum B71, sum varð uppsagdur, hevur stevnt felagnum eftir lønini, sum hann hevði tryggjað sær í sínum sáttmála. *Hvussu eitur venjarin?*

**10** *Hvussu eitur formaðurin í Ferðavinnufelagnum?*

**1-4** Ikki nóg gott
**5-7** Tú fylgir hampuliga væl við
**8-9** Tú fært tað mesta við
**10** Veist tú alt?

**SVAR**

*1. Hirtshals, 2. BankNordik, 3. Jóannes Erik Køtlum, 4. 50 ár, 5. Lene Espersen, 6. Nagasaki, 7. Estland, 8. Esperanza, 9. Frankie Jensen, 10. Jákup Sverri Kass*

**10 TING UM** Kylie Minogue

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Australska poppstjørnan

**HON** GJØRDIST FYRST KEND SUM **SJÓNLEIKARI**, MEN SUM **POPPSANGARI** ER HON VERULIGA BLIVIN KEND KRING ALLAN **HEIMIN**

**1** 42 ára gamla Kylie Ann Minogue varð fødd í Melbourne í Australia. Hon er kend sum poppsangari og sjónleikari.

**2** Pápi hennara var skrivstovumaður og mamman var í síni tíð dansari. Mamman er ættað úr Wales, og pápin hevði írskar forfedrar.

**3** Systur Kylie eitur Dannii og hevur eisini roynt seg sum sangari. Hon er eisini kend sum dómari í bretska X Factor. Beiggi teirra býr í Australia, har hann arbeiðir sum kameramaður.

**4** Kylie gjørdist longu sum barn kend í Australia, tí hon spældi ymiskar smærri leiklutir í sjónvarpsrøðum har.

**5** Stóra gjøgnumbrotið kom í sjónvarpsrøðini Neighbours, sum eisini gjørdist sera væl umtókt í Bretlandi. Í 1987 hugdu 20 milliónir bretar eftir einum parti, har Kylie giftist við Jason Donovan. Teys ungu seinni duett saman.

**6** Í 1987 gav Kylie fyrstu stakplátuna út í Australia. Sangurin var The Loco-Motion, og hann gjørdist mest seljandi sangur í Australia í 80'unum.

**7** Hetta fekk bretar at lokka Kylie við plátusáttmála, og tá sangurin I Should Be So Lucky kom út í 1988, gjørdist tað byrjanin til eina veruliga yrkisleið sum poppsangari.

**8** Kylie hevur selt næstan 70 milliónir eintøk av sínum útgávum, og hon hevur vunnið eina røð av heiðurslønum fyri sín tónleik.

**9** Tann fitta og pena Kylie gjørdist í 2000 og frameftir meira frek og avbjóðani í sínum sjónbandaløgum

**10** Í 2005 fekk hon viðgerð fyri bróstkrabba, men kom væl fyri seg aftur og fekk gongd á útgávur og konsertir aftur.

**SITAT**



Eg trúgvi, at eitthvørt menniskja hevur eitt avmarkað tal av hjartasløgum, og eg ætli mær ikki at spilla nakað av mínum burtur við renna runt og íðka.

***Buzz Aldrin***
*astronautur*